# NØVN

SAMBAND
MAGNUS GUNNARSSON
MAGGI@SOSIALURIN.FO
TLF 341800 FAX 341801

*Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.*

## Lars Djurhuus 60 ár



Fríggjadagin 20. oktober fyllir Lars Djurhuus í Porkeri 60 ár.

Lars er sonur Charlottu og Gudmund Djurhuus í Porkeri. Gudmund andaðist í 2003.

Lars er giftur við Annu, fødd Thomsen. Hon er dóttir Fridu og Andrew Thomsen í Porkeri og eiga tey 5 børn, Gudmundur, Andrass, Charlottu, Eyðfríð og Hallur. Tey eiga eisini 3 abbabørn.

Eftir at hava tikið realprógv, fór Lars til skips við abbabeiggjanum, Johan í Gjørðum, við Suðurland. Lars dámdi væl sjólívið og var eisini í nøkur ár við Petur á Gørðunum, har Andrias Mikkelsen, maður Bette, ið er mostur Lars, var skipari.

Í 1966 fór Lars á læraraskúla, har hann tók prógv í 1971, og hevur hann síðani tá verið lærari við Vágs skúla øll árini, undantikið 1974, tá ið hann var á ársskeiði á Fróðskaparsetrinum, og í 1975 tá ið hann var hann vikarur við Adventatistaskúlan.

Lars hevur verið skrivari hjá Porkeris kommunu síðan 1976, og hevur hann sostatt røkt hetta arbeiðið í 30 ár.

Lars er í umsjónarráðnum hjá Suðuroyar Sparikassa, har hann bleiv valdur í 1977, og hevur hann øll árini sitið sum formaður.

Í frítíðini dámar Lars at fara á flot við báti sínum, og eisini fæst hann við seyð.

Í samkomuni Betania í Porkeri hevur Lars víst trúskap og er ein góður stuðul.

Føðingardagin heldur Lars í heimi sínum frá kl. 19.

†

### Andlát og jarðarferðir

Kistan við **Óla Frits Hansen av Húsum** fer úr kapellinum á Klaksvíkar sjúkrahúsi hósdagin kl. 16 til Sam. Jarðarferðin verður úr Húsar kirkju fríggjadagin kl. 13.30. Sálmabókin verður nýtt. Tey, ið vilja minnast Óla, kunnu lata Húsa kirkju ein gávu; konta í Føroya Banka og Norðoyar Sparikassa. Í samband við jarðarferðina siglir Sam av Klaksvík kl. 12.

Kistan við **Poul Eli Hansen** fer frá Landssjúkrahúskapellinum fríggjadagin kl. 16. Jarðarferðin verður úr Kollfjarðar kirkju leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Poul Eli, kunnu lata Føroya felag móti krabbameini ein gávu; konta í peningastovninum.

Konfirmatión í Funningi í 1956:

## Konfirmantar hittust aftur



15. apríl 2006 vóru liðin 50 ár síðan hesi vóru konfirmeraði í Funnings kirkju av Zacharis Brimnes presti.

Dagurin byrjaði við guðstænastu í Funnings kirkju, har Emil Olsen prestur prædikaði.

Eftir guðstænastuna lá leiðin ti Eiðis, har ein hugnaløta var á hotellinum.

Á myndini eru t.v.: Emil Olsen, prestur, Súsanna Ellingsgaard, Eiði (f. Joensen av Oyrarbakka), Sniðálvur Jóanesarson, Voss, Noreg (úr Funningi), Zacharias Joensen, Tórshavn (av Norðskála), Árni Joensen, Tórshavn (frá Gjógv), Solveig Juul Joensen, Haldarsvík (f. Juul úr Funningi), Palma Wang, Kvívík (f. Sigurstein úr Funningi).

Hesi vanta á myndini: Elinborg á Garðsendanum, Norðskáli (f.Petersen), Hilda McKay, Funningur, og Hilmar Johannesen, Tórshavn (frá Gjógv).

### Tøkk

Hjartans tøkk øll tit sum fylgdu

**Jólsvein**

til gravar sunnudagin hin 15. oktober 2006.

Tøkk til Jógvan Fríðriksson prest, til sangarar, berarar, starvsfólk á kirkjugarðinum, í Havnar kirkju og Gravarhjálpina.
Tøkk øll tit, sum hjálptu til við ervinum, tøkk fyri blómur og kransar.
Tøkk familja og vinfólk, og tøkk øll starvsfólk á B6 á Landssjúkrahúsinum, tøkk til Hotel Tórshavn í Keypmannahavn og tøkk fái tit, sum so trúliga vitjaðu hann, meðan hann var sjúkur.

*Vinarlig heilsan*

**Erla, Heidi og Erland og familjur teirra**

**Dagurin í morgin**

**20. oktober. Felicianus,** deyður umleið ár 250. Foreldur hansara vóru kristin fólk í Forum Flamini í Italiu. Ungur kom hann til Róm og gjørdist erkadiakonur hjá pávanum. Pávin Viktor setti hann sum biskup í heimbygdini. Keisarin Decius læt hann taka av døgum.
Hans Andrias Djurhuus varð føddur hendan dagin í 1883, og Mikkjal á Ryggi doyði hendan dagin í 1956.



Lesið Sosialin so eru tit við